52-049/2025

**FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 28. november 2025
J. nr.: 25/ 31526

**Svar uppá fyrispurning nr. 52-049/2025 frá Grímur Sundstein, løgtingsmanni, settur Ruth Vang, landsstýriskvinnu í fíggjarmálum, um endurgjald fyri AMEG goldið í ósamsvari við norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd.**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur Fíggjarmálaráðið gjørt nakra endurgjaldsætlan fyri AM-gjøld, sum TAKS vegna AMEG hevur kravt inn í ósamsvari við norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd fyri árini áðrenn 2019 ?
2. Verður eitt møguligt endurgjald goldið afturvirkandi til, tá norðurlendski sáttmálin um sosiala trygd fekk gildi, uttan fyrning og við rentum ?

**Svar til spurning nr. 1 og 2:**
Við løgtingslóg nr. 87 frá 7. mai 2025 um afturrindan av heilsutrygdargjaldi er neyðug heimild fingin til vega fyri at afturrinda heilsutrygdargjald, tá talan er um persónar, sum fyri sama tíðarskeið hava goldið bæði heilsutrygdargjald og sosial trygdargjøld í øðrum Norðurlandi.

Sum upplýst í svari til § 52 a spurning nr. 52/037/2024 verður avgerð um afturrindan av AM-gjøldum og um hvussu langt farið verður aftur í tíð, ætlandi tikin við støði í sama lesti sum fyri afturrindan av heilsutrygdargjaldi. Neyðugt er tó fyrst at fáa heimildina til vega, eins og fyri heilsutrygdarskjalið.

T.v.s. at ein afturrindan AM-gjøldum fer fram eftir umsókn og er treytað av, at sosial gjøld bæði eru goldin í Føroyum og øðrum Norðurlandi. Afturgjaldskravið verður harnæst lækkað við frádrátti í skatti sambært § 154 b í skattalógini eins og fyri afturrindan av heilsutrygdargjaldi.

Annar munurin er, at rætturin til útgjald úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum ikki sjálvvirkandi fellur burtur orsakað at einari afturrindan. Spurningurin er tí, hvørja ávirkan ein møgulig afturrindan skal hava á rættin til útgjald úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum, men arbeitt verður fram ímóti, at útgjaldið úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum lækkar útgjaldbrotið við 1/40 fyri hvørt ár, sum afturrindað verður fyri.

Afturrindanin verður renturoknað sambært galdandi reglum í tann mun, kravánarin hevur kravt rentu.

Tinganes, 28. november 2025

**Ruth Vang**
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum